**ØSKUROK**

*Í 1982 fleyg eitt flogfar hjá British Airways inn í eitt øskuskýggj, sum stavaði frá einum gosi í Indonesia. Allir teir fýra motorarnir steðgaðu, men tað eydnaðist manningini at fáa teir aftur í gongd og at neyðlenda*



– Vit hava ein lítlan trupulleika:

# ALLIR MOTORARNIR ERU SLØKNAÐIR

**ELDGOS** Tað stóra Jumbojet-flogfarið hjá British Aliways var á veg úr London til Auckland í Ný Sælandi, tá allir teir fýra motorarnir brádliga steðgaðu. Orsøkin var, at flogfarið var komið inn í eitt øskuskýggj frá einum gosfjalli

Árni Joensen

Tað er synd at siga, at Eric Moody, flogskipari á British Airways-flogfarinum frá London til Auckland í Ný Sælandi, gjørdi ov nógv av, tá hann tók mikrofonina:

- Ladies and Gentlemen, this is your Captain speaking. We have a small problem. All four engines have stopped. We are doing our damnedest to get them under control. I trust you are not in too much distress.

Ferðafólkini í BA-flogfarinum mundu ána ilt, longu áðrenn tey hoyrdu boðini frá flogskiparanum. Luftin í ferðafólkarúminum var farin av lukta av svávuli, og uttanfyri sóu tey eitt sjáldsamt ljós, sum fór ígjøgnum motorarnar.

Sannleikin var, at flogfarið var júst komið inn í eitt øskuskýggj frá indonesiska gosfjallinum Gunung Galunggung, uttan at flogskiparin ella hini av manningini vistu tað. Avleiðingin var, at flogfarið bleiv sandblást, samstundis sum øskan setti seg fasta inni í motorunum.

Eric Moody, flogskipari, visti, at tað stóra Jumbojet-flogfarið fall ein kilometur niður fyri hvørjar 15 kilometrar, tá gleið ígjøgnum luftina. Hann og hevði sostatt 23 minuttir til at fáa motorarnar aftur í gongd. Eydnaðist tað ikki, var einki at gera.

Tá hæddarmátarin umborð á BA-flogfarinum vísti, at tað var 4.100 metrar uppi, gav Eric Moody manningini boð um at royna at seta motorarnar í gongd. Tann fyrsti fór í gongd, eisini tann næsti, og lítla løtu seinni gingu allir fýra. Moody gjørdi av at neyðlenda í Jakarta, og alt gekk eftir ætlan.

Søgan um hendingina við BA-flight 9 er frá 1982 og er tann best kenda frásøgnin frá einum flogfari, sum fekk trupulleikar av gosøsku. Søgan er millum annað kend av, at sjónvarpsstøðin Discovery hevur gjørt eina sera sannførandi sending um tilburðin.

## Fall 4.000 metrar

Eric Moody er minni enn so tann einasti flogskiparin, sum hevur havt trupulleikar av gosøsku. Í 1989 fleyg eitt Jumbojet-flogfar hjá niðurlendska felagnum KLM beint inn í eitt øskuskýggj, sum stavaði frá frá einum gosi úr gosfjallinum Mount Redoubt í Alaska. KLM-flight 867, sum var á veg úr Amsterdam til Tomyo, var bara seks mánaðir gamalt, og eisini hesaferð var avleiðingin, at allir teir fýra motorarnir sløknaðu.

Ta næstu løtuna fall flogfarið næstan 4.000 metrar. men tá eydnaðist tað Karl van de Elst, flogskipara og manning hansara at fáa allar fýra motorarnar aftur í gongd og at neyðlenda í Anchorage í Alaska. Tað kostaði 80 milliónir dollarar at umvæla skaðan av gosøskuni. Men flogfarið bleiv umvælt og flýgur enn tann dag í dag fyri KLM.

Tað finnast fleiri onnur dømi um, at flogfør hava fingið trupulleikar av gosøsku. Eitt nú sigst, at umleið 40 flogfør fingu smærri trupulleikar av øsku frá gosfjallinum Pinatubo í juni í 1991.

## Sera sjáldsamt

Tað kann eisini vera hættisligt í dag, um flogfør koma í øsku frá einum eldgosi, men ávaringarskipaninar eru munandi betri nú, sigur Eivind Bjurstrøm hjá SAS við norsku tíðindastovuna NTB. Hann vísir tó á, at øskan kann órógva tólini í flogfarinum, eitt nú tað tólið, sum mátar, hvussu skjótt flogfarið flýgur, og at tað kann fáa flogskiparan at taka skrivar avgerðir.

Harafturat kemur, at nøkur tól í flogførunum brúka luft til køling, og vil illa til, kann øskan typpa skipanina. Eisini er vandi fyri, at øskan kann koma inn í sjálvt ferðafólkarúmið, soleiðis at ferðafólkini fáa brúk fyri meiri súrevni, sum frammanundan er avmarkað, sigur Eivind Bjurstrøm.

Men tann størsti vandin við gosøsku er avgjørt, at motorarnir kunnu steðga.

-Øskan kann sleppa inn í brennikamarið í motorinum. Har verður hon hitað upp, so hon bráðnar og kann typpa motorin. Motorurin missir orku og steðgar. Men hetta hendir bara, um flogfarið kemur í nógva øsku, og tað hendir sera, sera sjáldan, sigur Eivind Bjurstrøm við NTB.

arni@sosialurin.fo